# Ongin leiðari til liðugt eldrasambýlið

**Fyri jól varð nýggja eldrasambýlið í Klaksvík klárt til at taka í nýtslu. Men av tí at ongin leiðari er settur enn, so standa tey 16 búplássini í sambýlinum framvegis tóm. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri sigur, at bíðað verður eftir Almannamálaráðnum**

ELDRARØKT
*Solby A. Eliasen*



*Inni í eldrasambýlinum undir Kráargøtu í Klaksvík er alt tilreiðar. Tað einasta, sum manglar nú eru búfólk og starvsfólk. Men allarfyrst má ein leiðari setast*

**Klaksvík:** Eldrasambýlið undir Kráargøtu var liðugt áðrenn jól, men leiðarastarvið er ikki sett enn. Og tí kunnu búfólk ikki verða upptikin sum er.

– Tað er Almannamálaráðið, sum hevur ábyrgdina av at seta leiðaran, og vit bíða bara eftir teimum, sigur borgarstjórin, sum nú er farin at ótolnast.

Borgarstjórin sigur, at tað kann ikki vera meiningin, at eitt spildurnýtt eldrasambýli stendur púra klárt, men verður ikki nýtt, tí ongi starvsfólk eru. Leiðarastarvið er, so vítt sum borgarstjórin í Klaksvík veit at siga, heldur ikki lýst leyst enn, so hann væntar, at tað fer at ganga rúm tíð, áðrenn sambýlið verður tikið í nýtslu. Og tað kann tykjast løgið, serliga við akuttu støðuni á eldrarøktini í huga.

Steinbjørn Jacobsen greiðir frá, at kommununan fekk at vita, at ongir pengar vóru til starvsetanina í fjør, men í 2003 skuldi tað nokk fara at verða.

Nú eftirlýsir hann starvslýsingini, sum ikki hevur verið at sæð enn. Steinbjørn heldur eisini, at fyri tað um ongir pengar vóru til at seta ein leiðara, so kundi Almannamálaráðið havt søkt eftir leiðaranum í 2002, men ikki at byrja fyrr enn 1. januar 2003.

– So var alt tilreiðar við ársbyrjan. Men soleiðis sum støðan er nú, so kann ein ganga út frá, at tað fer at ganga ein tíð afturat áðrenn nakað fólk fær gleði av sambýlinum, tí fyrst má leiðarin verða settur og síðani skal viðkomandi seta starvsfólk og búfólk, og alt tílíkt tekur tíð, tað vita vit, sigur Steinbjørn, sum er sera harmur um, at kommunan ikki fær gjørt nakað.

– Vit noyðast at bíða eftir Almannamálaráðnum og fáa tí onki gjørt, sigur borgarstjórin at enda.

Sambýlið undir Kráargøtu hevur 16 búpláss. Tíggju fastbúgvandi og seks til umlættingar.

### Starvsflokking

Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóri í Almannamálaráðnum, sigur, at orsøkin til, at starvið sum leiðari ikki er lýst leyst enn, er, at hetta er eitt nýtt starv, og tá eru ávísir framferðarhættir, sum skulu fylgjast.

Hann greiðir frá, at ein flokking av starvinum skal verða tøk frá lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum, áðrenn starvið kann lýsast leyst og setast. Og tað seinasta, sum Eyðun Mohr Hansen hevur frætt, er, at týsdagin kom henda flokking av starvinum so í hendurnar á Almannamálaráðnum. So nú hava tey fingið grønt ljós til at søkja.

Men Eyðun Mohr Hansen hevur ikki ábyrgdina av starvssetanum og øðrum, og tí kann hann ikki siga, nær starvið verður lýst. Tað er Jákup Foldbo, stjóri fyri heimarøktini/serforsorgini, sum hevur ábyrgdina av hesum økinum. Men hann sat á fundi og var ikki at hitta, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Listaframsýning í miðbýnum í Havn



*Listarmaðurin Sofus Poulsen fer at sýna fram í Snarskivuni hjá Tórshavnar Býráð*

FRAMSÝNING

Í dag, hósdagin, 23. november kl. 16.00, letur Sofus Poulsen upp listaframsýning á Torginum í Snarskivuni. Talan er um 20 oljumálningar.

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Hugnaliga forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til listaframsýningar, sum mentamáladeildin skipar fyri.

Síðani Snarskivan læt upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram, og nú er Torgið karmur um eina framsýning hjá Sofusi Poulsen.

Framsýningin verður hangandi uppi mars mánaði út.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í snarskivuni, mánadagfríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

# Color Line - byggja heimsins størstu cruiseferju

**Norska reiðaríið Color Line hevur bílagt heimsins størstu cruiseferju, ið verður liðug um góð 2 ár. Prísurin verður 2,2 milliardir norskar krónur. Ferjan kemur at taka 2.770 ferðandi og eina 2,5 km langa røð av persónbilum og trailarum.**

HEIMSINS STØRSTA
*Magnus Gunnarsson*



*Ferjan hjá Color Line, sum verður liðug um góð tvey ár, verður heimsins størsta cruiseferja*

Talan er um størsta ordran uppá eitt einkult skip í norskari skipasøgu. At byggja heimsins størstu og mest nútímans cruiseferju er eitt stórt stig fyri Color Line. Vit gera tað við framtíðini í huga, sigur fyrisitingarstjórin Trond Kleivdal. Ferðamannvinnan er tann skjótast vaksandi vinnan í heiminum, og tann møguligi marknaðurin fyri ferðafólk, sum ferðast við cruiseferjum til Norra, er sera stórur. Við hesum nýggja skipinum kemur Color Line útnýtta hesar møguleikar.

Ferjan kemur at taka 2.770 ferðafólk og eina 2,5 km langa røð av persónbilum og trailarum. Hon skal sigla á rutuni millum Oslo og Kiel, og kemur hon at avloysa ferjuna, MS Prinsesse Ragnhild, hjá Color Line. Nýggja ferjan verður bygd á skipasmiðjuni, Kværner Masa-Yards í Finlandi, sum norðmenn eiga. Color Line sigla annars í trimum rutum til Danmarkar, einari til Svøríkis og einari til Týsklands.

*Kelda: Tarnsportmagasine*



# Átala príshækking hjá Strandferðsluni

**Kommunurnar í Suðuroy mótmæla at prísirnir hjá Strandferðsluni hækka, tí tað er steinue oman á byrðu hjá útjaðaranum**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Eftir tí, sum er upplýst, fara prísirnir hjá Strandferðsluni at hækka eini 20% í summum førum. Eitt nú fer prísurin at flyta ein persónbil ímillum Havnina og Suðuroynna úr 120 krónum, sum hann kostar nú, upp í 144 krónur og vanligi ferðaseðilin fer at kosta einar 85 krónur afturímóti 70 krónum, sum hann kostar nú*

Kommunurnar í Suðuroynni mótmæla nú alment, at prísirnir at flyta farm og ferðafólk til flutning til útjaðaran hækka.

Í einum brævi, sum tær almannakunngjørdu í gjár, siga tær sjey kommunurnar í Suðuroy, at tær harðliga átala ætlaðu príshækkingina hjá Strandferðsluni.

– Henda framferð kann ikki góðtakast og er als ikki í samsvari við fráboðaða útjaðarpolitikkin, sum skuldi stimbra undir vinnulívið og livikorini í útjaðaranum, so at hesin partur av Føroyum eisini kom upp í part og fekk nøkulunda somu møguleikar sum miðstaðarøki, siga kommurnar

Tær leggja afturat, at hendan kappingar avlagandi príshækking, sum skaðar vinnulív, ferðavinnu og livikorini annars í útjaðarinum, er sum steinur omaná byrðu hjá útjaðaranum.

Allar tær sjey kommunurnar í Suðuroynni hava undirskrivað mótmælið. Tær eru: Sumbiar-, Vágs-, Porkeris -, Hovs -, Fámjins -, Tvøroyrar - og Hvalbiar Kommuna.

# Dýrari barnaansing í Porkeri

**Nú verður eitt sindur dýrari at hava børn í dagrøkt í Porkeri. Bygdarráðið hevur eisini keypt hús til umisiting**

KOMMUNUMÁL
*Áki Bertholdsen*



*Týskvøldið hevði bygdarráðið í Porkeri sín fyrsta fund í ár. Frá vinstru eru tey: Heri Danielsen, Sigmund Olsen, Hans Eli Bech, varaborgarstjóri, Eli Frederiksen, borgarstjóri, Lars Djurhuus, skrivari og Anna Djurhuus*

**Porkeri:** Nú fer tað at verða eitt sindur dýrari at hava børn í dagrøkt í Porkeri.

Tað samtykti bygdarráðið á ársins fyrsta fundi týskvøldið.

Síðani dagrøktin varð sett á stovn í 1997, hevur tað kostað foreldrum 1.224 um mánaðin at hava eitt barn í dagrøkt fulla tíð.

Men síðani eru allir prísir farnir upp og bygdarráðið sigur, at nú er tað tískil neyðugt at dagføra prísirnar. Sostatt varð samtykt, at tað nú skal foreldragjaldið vera 1.370 krónur um mánaðin at hava eitt barn í dagrøkt fulla tíð.

Bygdaráðið hevur samtykt eina fíggjarætlan, har ein fortreytin er, at foreldragjaldið er 195.000 krónur í ár tilsamans og tí er neyðugt at dagføra gjaldið.

Í dagrøktini í Porkeri eru eini 20 børn, men umroknað til fulla tíð, eru tey 12-13. Dagrøktarmammurnar eru fýra í tali, men kanska kemur ein afturat skjótt.

Í dag er barnaansing kommunalt mál burturav, so kommunan betalir alt tað, sum foreldrini ikki betala.

Tá ið barnaansingin varð sett á stovn fyri góðum fimm árum síðani, kostaði hon kommununi góðar 100.000 krónur, men í ár kostar hon kommununi 540.000 krónur, so vøksturin er stórur.

Men bygdaráðslimir tóku hetta sum eina góða íløgu, tí tað merkti, at fleiri foreldur høvdu arbeiði og sostatt kom eisini meiri inn í skatti og merkti eisini, at tað var meiri liviligt í bygdini.

Bara varaborgarstjórin, Hans Eli Bech, var ímóti at hækka gjaldið. Hann helt at tað var nóg høgt og at tað kundi ikki verða meiningin, at foreldur ikki skuldu hava ráð at hava børnini í dagrøkt.

### Keypa hús

Annars hevur Porkeris Kommuna eisini keypt hús til umsiting. Tað er gamla møblasølan hjá Hákun Djurhuus, sum bygdarráðið hevur samtykt at keypa fyri 300.000 krónur.

Húsið stendur undir liðini á húsinum, sum kommunan nú er í. Ætlanin er at brúka nýggja húsið til umsiting og á fíggjarætlanini hjá kommununi í ár eru 200.000 krónur settar av til at umvæla húsið fyri.

Men hvat húsið, sum kommunan nú er í, skal brúkast til, er støða ikki tikin til enn.

Ein møguleiki er at hava tey at goyma amboð og útgerð hjá kommununi í, tí tað hevur kommunan onki høli til annars. Ein annars møguleiki, sum er nevndur, er at taka tað niður og at gera stykkið til parkeringsøki.

Porkeris Bygdarráð hevur eisini samtykt at stuðla Suðuroyar Kunningarstovu við 6.000 krónum í ár. Men bygdarráðið vónaði, at tað bleiv í ár, at álvari varð burturúr ætlanini eisini at lata kunningarstovu upp í Vági. Annars er bara kunningarstova á Tvøroyri.

# Nýggi hvalbiartrolarin liggur nú á Skála

**Á midnátt týskvøldið kom nýggi hvalbiartrolarin til Føroyar úr Íslandi. Hann skal nú á beding á Skála, áðrenn hann fer til fiskiskap**

SKIPSKEYP
*Áki Bertholdsen*




*Her liggur nýggi hvalbiartrolarin við bryggju á Skála. Hann hevur fingið navnið Sjaðaklettur, men um tað verður endaliga navnið, er ikki heilt greitt enn.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Hvalba:** Á midnátt týskvøldið komu Hvalbingar til Føroyar við nýggja trolaranum, teir hava keypt úr Íslandi.

Tað er íslendski trolarin, Dala- Rafn, úr Vestmannaoyggjum, sum hvalbingar nú hava keypt.

Tað eru menninir aftanfyri djúpvatnstrolaran, Steintór, sum nú keypa ein trolara afturat og sunnukvøldið fóru teir úr Íslandi til Føroyar við skipinum.

Sjey mans sigldu trolaran heim, tveir íslendingar og fimm føroyingar. Veðrið var ófantaligt, men teir halda, at skipið bar seg væl. Felagið, sum eigur nýggja trolaran, nevnist Sjaðaklettur og trolarin hevur eisini fingið navnið Sjaðaklettur. Men um hetta verður endaliga navnið, er ikki heilt greitt enn.

Menninir aftanfyri Steintór hava leingi leitað eftir einum hóskandi trolara, bæði í Íslandi, Onglandi, Týsklandi og í Noregi.

Fyri nøkrum árum síðani keyptu teir á Steintór fiskiloyvið hjá djúpvatnstrolaranum, Beintu, av Tvøroyri, tá ið hon varð seld av landinum, og nú hava teir so fingið ein trolara at brúka tað fiskiloyvi.

Sjaðaklettur er ein djúpvatnstrolari, sum líkist Mýlingi. Hann er bygdur í 1975, men hann er væl hildin. Maskinorkan er er 1500 hestar.

Hann kostar fýra milliónir at keypa við reiðskapi, men tað er rættiliga nógv at gera við hann, áðrenn hann verður góðkendur og klárur at fara til fiskiskap og væntandi fer hann at tátta í 10 milliónum, tá ið hann verður klárur at fara til fiskiskap.

Sjaðaklettur fer nú á beding á Skála, har tað verður gjørt við hann, sum skal og hann væntar, at hann verður klárur at fara til fisksikap um ein mánaða.

Mikkjal Hammer, vanliga nevndur Mikki, er reiðari og hann væntar, at hann verður klárur at fara til fiskiskap síðst í februar mánað.

Tað verður Tórhallur Randrup, sum skal føra Sjaðaklett, hann hevur verið skipari á Mýlingi

Nýggi hvalbiartrolarin fer at avreiða, har prísurin er bestur og tað vóna teir, verður til flakavirkið í Hvalba.